# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð.
# Bygdarráðsfundur tann 14. mars 2006, kl. $19^{00}$.

**Bygdarráðslimir á fundi:** Karl A. Olsen, Jón Mikkelsen, Jákup Oluf Hansen, Pauli Trond Petersen, Øssur Christiansen, Jóhan Simonsen og Marjun S. Olsen.
**Skrivari**: Jákup Durhuus.

---

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri boðaði Jóhan Hendrik Hansen á seinasta fundi frá, at honum berst frá at røkja starv sítt sum bygdarráðslimur frá nú av og fram til september mánaða í ár, og at tiltakslimur fær fundarboð í hansara stað.

Tiltakslimurin Jóhan Simonsen hevur við skrivi, dagf. 8. mars 2006, fingið fundarboð.

Sambært grein 18, stk. 3, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, skal kommunustýrið gera av, um treytirnar fyri inn-kalling av tiltakslimi eru loknar.

Bygdarráðið samtykti einmælt at góðkenna innkallingina av Jóhan Simonsen sum tiltakslimi.
Bygdarráðið samtykti somuleiðis einmælt at velja Jóhan Simonsen í somu nevndarsessir, sum Jóhan Hendrik Hansen frammanundan hevur havt.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð:**

**Mál 34.**
Tilmæli frá Teknisku Nevnd til fyrispurning frá **Jóhannus Andreasen** um møguleikan fyri at broyta ásetingarnar í bygdarskipanini fyri part av ogn hansara matr. nr. $109^{a}$.
J. nr. 2005-250
Nevndin mælir til ikki at ganga fyrispurninginum á møti.

**Viðv. 34.**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 35.**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini til tilboð uppá **wevmyndatól** til heimasíðuna.
J. nr. 2005-255
Nevndin mælir til at taka av tilboði frá Knassum, dagf. 7. februar 2006, uppá 14.515,- kr uttan mvg.

**Viðv. 35.**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 36.**
Tilmælir frá Teknisku Nevnd og Fíggjarnevndini til uppskot frá Teknisku Deild um at avseta upphædd til keyp av **uttanhýsis tekniskari ráðgeving.**
Skotið verður upp at seta 210.000 kr av til endamálið.
J. nr. 2005-258

Tekniska Nevnd mælir til at játta upphæddina. Málið annars beint í Fíggjarnevndina til viðgerðar.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum frá Teknisku Nevnd, og at upphæddin uppá 210.000 kr verður játtað av íløgukontuni.

**Viðv. 36.**
Tilmælini einmælt samtykt.

**Mál 37.**
Tilmælir frá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini til uppskot frá Øssur Christiansen um at keypa **líkvogn** til kommununa.
J. nr. 2005-229
Marjun S. Olsen, nevndarlimur, hevði frammanundan boðað frá, at hon ikki tekur undir við, at kommunan keypir líkvognin, men hon setti fram uppskot um, at heitt verður á kirkjuna um at keypa, eiga og reka ein møguligan líkvogn, men at kommunan kann fíggja koyringina til kirkjugarðin.

Trivnaðarnevndin mælir til at keypa líkvognin treytað av, at meirilutin av kommununum í Vágum, Kvívík og Vestmanna taka undir við einum samstarvi.
Trivnaðarnevndin samtykti at beina málið um fíggingina av keypinum til fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin mælir til at játta fíggingina um so er, at meirilutin av kommununum í Vágum, Kvívík og Vestmanna taka undir við einum samstarvi.

**Viðv. 37.**
Marjun S. Olsen viðmerkti, at hennara uppskot gekk út uppá at heita á kirkjuna ella onkran annan um at keypa líkvognin, og at kommunan fíggjar koyringina frá eitt nú kapelli til Vestmanna og innanbygda til kirkjugarðin.

Uppskotið frá Marjun S. Olsen varð felt við einari atkvøðu fyri og trimum ímóti. Pauli T. Petersen, Jákup Oluf Hansen og Jóhan Simonsen atkvøddu ímóti, ímeðan Karl A. Olsen, Jón Mikkelsen og Øssur Christiansen atkvøddu blankt.

Tilmælini samtykt við 6 atkvøðum fyri og ongari ímóti. Marjun S. Olsen atkvøddi blankt.

Bókin lisin — Fundur lokin kl. $20^{45}$.

Sign.:

| | | |
|---|---|---|
| Karl A. Olsen | Jón Mikkelsen | Jákup Oluf Hansen |
| Pauli T. Petersen | Øssur Christiansen | Jóhan Simonsen |
| Marjun S. Olsen | | |